## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



**Veðrið í dag**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sól av og á. Út á dagin gongur hann niður í vestan og minkar til lot til andøvsgul. Hitin liggur millum 5 og 9 stig.



**Veðrið hósdagin**
Lot til gul vestaneftir, sum út á dagin snarar í landsynning. Turt og nakað av sól. Hitin um dagin liggur millum 8 og 11 stig. Um náttina millum 6 og 8 stig.



**Veðrið fríggjadagin og leygardagin**
Tað verður meira skýggjað men turt. Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri, sum seinni gongur upp í landnyrðing. Hitin fer at liggja millum 5 og 8 stig.

# Føroya Bjór í Øllandi

**-Selv om Færøerne ikke er nogen stor etableret ølnation, så brygges der ting af særdeles høj klasse deroppe skrivar Politiken, sum hevur verið á ølmessu, um eitt nú myrka Black Sheep ølið hjá Føroya Bjór.**

FESTIVALUR
*Jan Müller*


POLITIKEN 1. SEKTION
Heste-vogne sælges
VÆK MED RYNKERNE PÅ 5 MINUTTER
Glukosamin og MSM
Bestil prisliste og information på tel: 4586 6712, eller klik ind på www.pharmacare.dk
Business trolleys
Folkefest i Ølland
Ølfestival

Tað er ikki hvønn dag, at føroysk virki og føroyska vørur fáa umtalu í donskum dagbløðum og so slettis ikki fáa innivist á stórum parti av baksíðuni í stóru donsku bløðunum. Men undantøk eru. Eitt nú sunnudagin 11. mai, tá nýggja bryggjmeistarinnan (!) hjá Føroya Bjór í Klaksvík, Annika Waag slapp at reklamera fyri føroyskum øli yvir mesta partin av baksíðuni á Politiken, sum er eitt tað størsta blaðið í Danmark.

Høvið er ein ølfestivalur, sum júst hevur verið í kongaliga høvuðsstaðnum. Á myndini í blaðnum síggja vit klaksvíkskvinnuna skonkja vælumtókta Black Sheep ølið í glasið - og sum blaðmaðurin umtalar sum flaggskipið hjá føroyska bryggjaríinum á básinum í Valbyhøllini. Føroya Bjór er við á stóru ølmessuni, sum verður hildin fyri triðju ferð.

Politiken, sum er høgt í metum millum avíslesarar, skrivar, at bryggjaríið í Klaksvík er ikki so kent í Danmark – enn. Men tað fer tað at verða. Og vit geva Henrik Palle, journalisti orðið: 'Selv om Færøerne ikke er nogen stor etableret ølnation, så brygges der ting af særdeles høj klasse deroppe. Blandt andet flagskibet Black Sheep, en mørk all malt lagerøl med karamelmalt og aromahumle og en alkoholstyrke på 5,8% samt pilsnerguldøllen 'Gull" på 5,8%. Begge er blevet belønnet med guldmedaljer ved internationale smagninger, og sidstnævnte er i øvrigt en af mest stabilt testede øller på Alfred Jørgensens laboratioium."

Ølfestivalurin endaði sunnudagin. Um føroyska ølið eftir messuna verður at síggja á donskum ølhyllum og standa seg í kappingini við donsku ølrisarnar Carlsberg og Tuborg sigur søgan einki um. Kanska jaliga umrøðan í Politiken fer at skapa áhuga fyri tí eksotiska ølinum úr Norðuratlantshavi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | 3 |
| Halifax | 5 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 16 |
| New York | 17 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst í ein landsynning stutt úr Føroyum gongur spakuliga í landnyrðing. Vestan fyri lágtrýstið rekur kølin luft av útnyrðingi og norði inn yvir Føroyar.




Seinni í vikuni kemur ein hátrýstryggur av útsynningi yvir Føroyar og hevur støðugari veður við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/05 kl. 06⁰⁰– 13/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,5 mm – mált frá 12/05 kl. 06⁰⁰–13/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 56,6 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

9. mai: Fyrra kvarter
15. mai: Mánin næstur jørðini
16. mai: Fullmáni

Kelda: Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. mai | 05.42 | 18.05 | 04.42 | 17.05 | 04.57 | 17.20 | 07.42 | 20.05 | 08.42 | 21.05 | 03.57 | 16.20 | 02.57 | 15.20 | 05.57 | 18.20 | 06.57 | 19.20 | 05.27 | 17.50 | 06.42 | 19.05 |
| 15. mai | 06.29 | 18.54 | 05.29 | 17.54 | 05.44 | 18.09 | 08.29 | 20.54 | 09.29 | 21.54 | 04.44 | 17.09 | 03.44 | 16.09 | 06.44 | 19.09 | 07.44 | 20.09 | 06.14 | 18.39 | 07.29 | 19.54 |
| 16. mai | 07.20 | 19.47 | 06.20 | 18.47 | 06.35 | 19.02 | 09.20 | 21.47 | 10.20 | 22.47 | 05.35 | 18.02 | 04.35 | 17.02 | 07.35 | 20.02 | 08.35 | 21.02 | 07.05 | 19.32 | 08.20 | 20.47 |
| 17. mai | 08.14 | 20.44 | 07.14 | 19.44 | 07.29 | 19.59 | 10.14 | 22.44 | 11.14 | 23.44 | 06.29 | 18.59 | 05.29 | 17.59 | 08.29 | 20.59 | 09.29 | 21.59 | 07.59 | 20.29 | 09.14 | 21.44 |
| 18. mai | 09.15 | 21.45 | 08.15 | 20.45 | 08.30 | 21.00 | 11.15 | 23.45 | — | 12.15 | 07.30 | 20.00 | 06.30 | 19.00 | 09.30 | 22.00 | 10.30 | 23.00 | 09.00 | 21.30 | 10.15 | 22.45 |

5 707265 100036 >